# Verjan stóð seg best



*Ferð eftir ferð hevur Jón Rói roynst millum teir allar bestu á landsliðnum, og nú Óli Johannesen ikki var í verjuni, átók hann sær púra náttúrligt ein meira stýrandi leiklut*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað var serliga skipanin av verjupartinum, sum eydnaðist væl hjá Føroyum leygardagin, har nýggju menninir spældu ein framúr góðan dyst saman við altíð stinna Jón Róa Jacobsen**

LEIKARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*

### 1. Jákup Mikkelse, Molde

Spælir í løtuni fyri at sannføra onnur enn Molde um, at hann er verdur at satsa upp á. Tað heldur føroyski landsliðsvenjarin hann vera, og enn hevur Jákup so ikki svikið álitið. Hevði sum so ikki tað stóra at gera, og málini fekk hann ikki gjørt nakað við, men tók annars tað, sum var skotið at honum. Ikki minst var bjargingin av púra leysa Sigurðsson týdningarmikil í fyrra hálvleiki.

### 2. Christian Høgni Jacobsen, NSÍ

Hevði fingið leiklutin á høgra bakki, har hann hevði til uppgávu at loysa Pól Thorsteinsson av. Ansaði sum vera væl man eftir skipanini av verjupartinum, har ein alla tíðina royndi at fylgja teimum ávísingum, sum givnar vóru. Eigur eisini rós uppiborið fyri hendan partin av spælinum, men fyri ein leikara við hansara evnum, hevði eisini verið ynskiligt, um hesi í størri mun eisini komu til sjóndar longur niðan eftir vøllinum.

### 3. Jóhannis Joensen, FS Vágar

Hevði fingið trupla leiklutin sum avloysari hjá Óla Johannesen, men sigast má, at hesin var loystur til UG. Gekk kanska nakað av tíð, áðrenn hann veruliga fall inn í spælið, men tá hetta so fyrst var gjørt, so steðgaði hann snøgt sagt ikki á aftur. Í so máta má næstan sigast, at tað er stórt spell fyri Jóhannis, at tað júst var hesa ferð, at hann skuldi vera so sannførandi á liðnum, tí júst hetta plássið er lítil ivi um, at Óli fær aftur.

### 4. Súni Olsen, GÍ

Hevði aftur hesa ferð fingið leiklut á vinstra bakki, og yvir høvur tykist tað ganga framá hjá honum á plássinum. Kropsliga tykist hann nú eisini vera komin somikið væl fyri seg, at hann ikki smæðist burtur í nærdystum, og fótbóltsliga er hann somikið væl fyri, at hann helst kann røkja flestu plássini á vøllinum. Hevði tó til tíðir trupulleikar í samskiftinum við Røgva Jacobsen uppi á miðvøllinum, men við bert tveimum dystum saman, fær hetta neyvan verið øðrvísi.

### 5. Jón Rói Jacobsen, Brøndby

Tað fær valla verið meira imponerandi enn tað sama hjá verjuálitinum hjá Føroyum. Hevur ferð eftir ferð roynst millum teir allar bestu á landsliðnum, og nú Óli Johannesen ikki var í verjuni, átók Jón Rói sær púra náttúrligt ein meira stýrandi leiklut. Er í nógvar mátar so framsíggin í spælinum, at honum als ikki nýtast at takla, tá bólturin skal takast, og hetta mátti sjálvt stóra stjørnan hjá íslendingum eisini sanna. At hann enn ikki hevur vunnið sær fast pláss í Brøndbyverjuni, sigur helst meira um styrkina hjá Brøndby, enn tað ger um evnini hjá Jón Róa.

### 6. Jann Ingi Petersen, B68

Var rættiliga óvæntað tikin inn á føroyska miðvøllin, tá fótbóltsevnini á hesum skuldu styrkjast, men tað var tó ikki so nógv, sum sást til hesi. Ikki minst tí stórur partur av fyrra hálvleiki varð nýttur at sparka langar bóltar niðan móti álopinum, og at føroyski miðvøllurin tí fyri tað koma at renna eftir returbóltum, heldur enn at spæla fótbólt. Var kanska komin nakað betri í spælið, tá útskiftingin kom, men hóast tað, so kann ikki sigast annað enn, at hon fall náttúrligt.

### 7. Fróði Benjaminsen, B68

Hevði aftur hesa ferð leiklutin sum tann meira spælstýrandi av føroysku miðvallarunum, men eins og hjá Jann Inga, so var tó avmarkað, hvat hann fekk skapt. Kanska kundi tað verið ynskiligt, at hann í størri mun sýndi sínar serstøku dygdir at flyta seg í tóm øki at fáa bóltin, men hinvegin var langa sendingin oftani farin, áðrenn Fróði var komin so langt. Sýndi tó eisini í løtum, at hann telist millum teir fáu, sum fysiskt megna at spæla upp til alla mótstøðu, og er helst ivaleysa tryggur í sessinum til komandi dystin.

### 8. Rógvi Jacobsen, HB

Hevði sum væntað fingið møguleikan í vinstru, og kropsliga sýndi hann eisini, at hann er førur fyri hesum. Hevur kanska ikki altíð skjótleikan á fyrstu metrunum til at koma ígjøgnum í síðunum, men fekk til tíðir kortini verið við í parti av føroyska spælinum. Gav sær tó í løtum ov góðar stundir við bóltinum, soleiðis at avleveringsmøguleikarnir vóru tiptir, áðrenn nakað spurdist burturúr. Krýndi tó avrikið við einum deiligum máli, sum tíverri ikki var nóg mikið at tryggja okkum stig.

### 9. Jákup á Borg, B36

Var aftur hesa ferð maðurin, sum legði upp til føroyska málið, og bara tað í sjálvum sær rættvísgerð, at hann skal vera millum teir fyrstu ellivu. Hevur tó eisini nógvar aðrar dygdir, sum koma føroyska liðnum til góðar, tá spælið skal flytast niðan gjøgnum síðurnar, men trupulleikin var bara, at hetta nærum ongan tíð hendi leygardagin. Við langu sendingarnar niðan í álopið var hann náttúrligt prísgivin, og tí var hetta ein av dystunum, har Jákup var óvanliga lítið við í spælinum.

### 10. John Petersen, B36

Hevði óvanliga ringar fortreytir at arbeiða undir, og tað merkti eisini spæl hansara. Kanska kundi ein sakna, at hann í størri mun leitaði oman eftir vøllinum, men serliga í fyrra hálvleiki hevði hetta tó kanska bara verið spill av kreftum. Kom nakað betri við eftir steðgin, tá spælið var eitt sindur nærri jørðini, men kom ongan tíð fram til teir møguleikar, sum vónirnar vórðu settar eftir.

### 11. Andrew av Fløtum

Hevði eins og álopsfelagin ring arbeiðslíkindi. Var kanska í enn størri mun raktur av hesum, tí hann náttúrligt mátti halda sær longri uppi á vøllinum. Gula kortið, sum hann fekk gav hartil við sær, at hann ikki verður við í stórdystinum mikudagin, so alt í alt var hetta ikki ein dystur, sum fer at teljast millum teir bestu hjá Andrew. Men sum sagt, so vóru fortreytirnar fyri hesum heldur ikki til staðar.

### 12. Julian Johnsson, B36

Var sera óvænta settur uttan fyri í dystinum, sum skuldi vera hansara stóra jubileum á landsliðnum, men fekk tó eitt sindur av eini uppreisn, tá hann varð settur inn. Ikki bara tí hann var partur í uppspælinum til føroyska málið, men eisini tí tað tóktist koma meira ferð á, tá hann kom inn. Ikki minst viðvirkaðu djúpu renningar hansara til, at íslendska organisatiónin partvíst varð brotin, og fysiskt er hann somikið væl fyri, at sjálvt ikki stóru íslendingarnir stóðu honum kurl, tá rennast skuldi langt eftir bóltinum.

### 14. Hjalgrím Elttør, KÍ

Fekk seinstu 25 minuttirnar á vøllinum fyri Andrew av Fløtum, og sýndi her, at hann væl kann vera eitt alternativ til álopssessirnar. Arbeiðssamur sum altíð var hann við í nógvum av tí lítla, sum gekk fyri seg á íslendsku hálvuni, og ta einu ferðina var eisini um reppi, at hann slapp leysur, men íslendska verjan var tó ov tung at rista av sær.



# Henrik iðraði seg

**- Eg skal ikki siga, at tað ikki var uppiborið, men tað er ótrúliga keðligt, at vit soleiðis fingu eitt mál ímóti okkum í evstu løtu**

VENJARIN
*Jákup Mørk – Reykjavík*



*Henrik Larsen helt, at Ísland spældi heilt øðrvísi, enn hann hevði sæð teir gjørt, og at hetta var stórur partur av frágreiðingini um, hví føroyska spælið niðan eftir vøllinum ikki koyrdi nóg væl*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Sådan er det jo bare med fodbold.

Vónbrotið lýsti úr føroyska venjaranum, tá hann eftir dystin kom skundani inn á tíðindafundin. Sum vera man, so fekk hann tó ikki fult og heilt givið hetta til kennar til tíðindafólkini, men royndi heldur at vísa á, at hann fyri tað mesta var nøgdur við sínar leikarar.

- Eg kann ikki siga annað enn, at eg eri nøgdur. Kanska hekk spælið hjá okkum ikki nóg væl saman í fyrra hálvleiki, men allir sum ein arbeiddu leikararnir sera hart í dystinum, og eg haldi tað vera stórt spell, at vit ikki fingu løn fyri hetta. Ikk minst tí vit faktist halda mótstøðuni frá at fáa alt ov nógvar møguleikar. Eg skal ikki siga, at tað ikki var uppiborið, men tað er ótrúliga keðligt, at vit soleiðis fingu eitt mál ímóti okkum í evstu løt,u helt venjarin, sum annars eisini hevði onkrar rósur at bera íslendska liðnum. Ikki minst, tá hann varð spurdur um, hví føroyska spælið ikki hekk nóg væl saman.

- Tað mugu vit so partvíst rósa mótstøðuni fyri. Sjálvur havi eg sæð onkrar dystir hjá teimum á sjónbandi, og har vístu teir langt ífrá sama nærlagni í spælinum, sum teir gjørdu í dag. Ein partur av fótbólti er jú eisini mótstøðuliðið, og tíverri kanst tú ikki velja, hvussu hesir skulu spæla, men sjálvandi vónar tú altíð, at teir hava ein ringan dag.

### Meira bóltspæl

Eitt, sum føroyska forvitnið eftir dystin snúði seg um, mundi ivaleyst vera, hví Henrik Larsen hevði valt at byrja við Jann Inga Petersen inni. Ella rættari, hví Julian Johnsson eftir 49 dystir sum fastur maður, brádliga var at síggja á beinkinum.

- Tað kom fyrst og fremst av mótstøðuni. Sjálvandi tosaðu vit nógv um hetta undan dystinum, og vit komu til ta niðurstøðu, at skuldu vit gera nakað við Ísland, so var tað fyrst og fremst í spælinum við bóltinum og ikki á kropsliga økinum. Tí tóku vit Jann Inga framum. So kanst tú altíð diskutera, um tað var tað rætta, nú spælið hjá okkum ikki hekk so væl saman, men tað er so í øllum førum ikki nakað, sum Jann Ingi skal hava skuldina fyri, helt Henrik eftir dystin.

# Nøgdur um sigurin

**Ásgeir Sigursson var sum vera man nøgdur um sigurin, men hann tóktist ikki heilt fegin um leiklutin, sum íslendsku miðlarnir hava havt í upptaktini til dystin**

VENJARIN
*Jákup Mørk*

Sum fyrrverandi stórleikari í týskum fótbólti kennir Ásgeir Sigursson helst alt til, hvussu stórt trýstið í yrkisfótbólti kann vera.

Men hann ásannaði, at trýstið á sær í seinastu minuttinum av dystinum móti Føroyum hevði verið stórt – sera stórt.

- Sæð yvir ein kamb, so haldi eg vit høvdu uppiborið at vinna dystin, og eg eri eisini væl nøgdir við tað spæl, sum leikarar mínir vístu í dag.

- Serstakliga í fyrra hálvleiki haldi eg, at okkara spæl gekk væl. Kanska ikki mitt á vøllinum, har vit ikki í nóg stóran mun fingu gjørt okkum dælt av at vera tríggir móti tveimum, men á kantunum gekk væl, og vit skaptu eisini fleiri vandastøður.

- Í seinna hálvleiki gekk kanska ikki heilt so væl við hesum, men tað var júst eftir eina slíka støðu, at vit skoraðu sigursmálið, og hejsi trý stigini gera í øllum førum, at tað nú verður væl lættari hjá okkum at fara undir næstu uppgávurnar.

Her í blaðnum endurgóvu vit landsliðsvenjaran fyri at siga, at talan var um landaskomm, um Ísland ikki vann dystin. Hetta vóru annars orð, sum saman við »skandalu« høvdu staðið í íslendskum bløðum í døgunum upp til dystin.

Spurdur um trýstið, sum hevði verið á sær seinastu løtuna, viðgekk Ásgeir eisini, at hetta hevði verið stórt, men tá ein blaðmaður so dittaði at spyrja, um hetta nú vildi verið tann skandalan, sum lagt hevur verið upp til, kom sinni í venjaran.

- Eg havi ongan tíð nevnt orðið skandala, og heldur ikki landaskomm. Tað er nakað, sum tit hava lagt mær í munnin, var svarið, og tá spurningurin var settur einaferð enn, var greiða svarið bara: Eg havi longu svara hasum. Eru aðrir spurningar?

### Ónøgdur um málið

Um føroyska spælið helt íslendski venjarin annars, at hetta gjørdist júst so torført, sum hann hevði ímynda sær.

- Sum lið standa føroyingar seg sera væl, og teir megnaðu at gera tað sera trupult fyri okkum, men eg haldi tó hinvegin, at vit hildu teimum heilt væl.

- Eg eri tó ikki nøgdur við málið, sum teir fáa. Ikki akkurát tí teir fáa mál, men tí hetta kemur eftir luftbólt, og júst í luftini eri eg annars av teirri fatan, at her vóru mest sum allir hjá okkum sterkari enn teir, so hasa støðuna má eg heldur síggja umaftur. Í øllum førum bendir tað á, at verjan hjá okkum ikki var nóg væl skipað í støðuni, helt Ásgeir Sigursson at enda, áðrenn bæði hann og íslendsku blaðmenninir vendu eyguni móti komandi dystinum hjá Íslandi, sum verður móti Litava nú mikudagin.



*- Sæð yvir ein kamb, so haldi eg vit høvdu uppiborið at vinna dystin, og eg eri eisini væl nøgdir við tað spæl, sum leikarar mínir vístu í dag, helt Ásgeir Sigursson eftir dystin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tað kundi – næstan - ikki verið betri

**Var tað ikki fyri úrslitið, so var tað tann perfekti dagurin hjá mær helt føroyski málskjúttin eftir dystin**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk*

Fyri fyrstu ferð síðani dystin í Slovenia slapp Rógvi Jacobsen at byrja inni í einum teljandi landsdysti, og tað eydnaðist honum eisini at seta sítt týðiliga fingramerki á hendan, tá hann eftir góðum tíma javnaði íslendsku leiðsluna.

Tað sá í mangar mátar út til, at talan var um eina væl vanda støðu, men sjálvur helt Rógvi ikki, at so var.

- Vit høvdu sum so ikki gjørt nakað eyka burtur úr hesum. Ikki annað enn tað, at vit undan dystinum avtalaðu, hvar hvør skuldi renna. Jákup sendi frísparkið innfyri, og har var eitt stórt hol hjá mær at renna í, og so var bara at seta høvdið á, helt Rógvi eftir dystin.

Og gleðin hjá føroyska málskjúttanum var sjónlig. Við troyggjuna í hondini helt hann beina leið yvir at føroyska venjarabeinkinum, har alt var á gosið, meðan íslendsku áskoðararnir sótu sum negldir aftanfyri.

- Tað er jú ikki hvønn dag, at tú skorar á landsliðnum. Og so als ikki í slíkum dysti, so tað ger nokk einki, um man flippar eitt sindur út, tá hetta hendir, helt smílandi skjúttin fyri, tá hann at enda varð spurdur um hetta.




*Við troyggjuna í hondini helt hann beina leið yvir at føroyska venjarabeinkinum, har alt var á gosið, meðan íslendsku áskoðararnir sótu sum negldir aftanfyri*